tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 113 Fríggjadagur 19. juni 1998 | 72. árgangur | www.sosialurin.fo | Kr. 8,00




*Afturhildin í hálvanfjórða mánað:*

## Eg eri ósekur

Í hálvanfjórða mánað hevur føroyski skiparin Sigmundur Andreasen veri afturhildin á lítlu oynni Reunion fyri ólógligan fiskiskap vestan fyri Madagaskar. Sjálvur sigur hann seg vera ósekan

**Síða 6**




## HB eigur hornini

HB vann føroysku steypafinaluna móti KÍ mikukvøldið og hevur nú vunnið løgmanssteypið til ognar

**Síða 22-23**

*Skotskur stjóri er sannførdur:*

# Sund skræddara-seymað sum oljuútgerðarhavn

Tórshavnar Skipasmiðja og skotska oljusamtakið ASCo fara nú at stovna eitt føroyskt-skotskt felag, sum skal reka eina oljuútgerðarhavn á Sundi. Donald Michie, stjóri í ASCo heldur, at havnaøkið á Sundi er sum bygt til oljuútgerðarhavn

**Síða 8**



Leivur Hansen, býráðsformaður í Havn, Poul Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, og Donald Michie, stjóri í skotska samtakinum ASCo, omanfyri havnaøkið á Sundi

# Upp til 40 prosent bíligari at byggja skip í Kina

Skipsmeklaravirkið Maretec á Argjum hevur tey seinastu árini bygt fleiri skip uttanlands, eitt nú í Póllandi og Spania. Alsamt fleiri reiðarar velja í dag at byggja skip í Kina, og Maretec hevur síðani 1995 eisini konsentrerað seg um kinesisku skipasmiðjurnar, har tað kann verða upp til 40 prosent bíligari at byggja skip enn í Europa

**Síða 25**



*Soleiðis kann koma at siggja út á Sundi um ikki so mong ár. Kelda ASCo-Føroyar*

um enn einaferð siga, at Sund er framúr gott pláss til eina útgerðarhavn.

Hann heldur, at føroyingar ikki eiga at gloyma, at bæði havna- og goymslufacilitetir, sum eru alfa og omega fyri eina útgerðarstøð, longu finnast, og at tú harvið ikki skal til at brúka nógva orku og nógvan pening til at byggja hetta upp av nýggjum. Og skuldi tað hent, at eingin olja finst, tá hevur tú ikki gjørt nakrar óneyðugar samfelagsligar íløgur. Tá vóru tær har longu frammanundan.

**Hjálp frá Stavanger og Peterhead**

Donald Michie heldur annars, at arbeiði teirra í bæði Norðsjónum og vestan fyri Hetland kann koma gongdini í Føroyum væl við. Tað er heldur ikki óhugsandi, at mongu skipini teir hava langtíðarleigað til uppgávur í Norðsjónum og vestan fyri Hetland kunnu gera brúk av føroyskum tænastuveitingum.

Av tí at ASCo hevur útgerðarhavnir í bæði Peterhead og Stavanger, kunnu hesar verða sokallaðar hjálparstøðir hjá eini støð á Sundi. So trýkanturin Sund, Stavanger og Peterhead kann gerast ein týðandi táttur í allari leitingini á Atlantsmótinum.

ASCo hevur annars gott samstarv við fleiri oljufeløg. Nøkur av teimum eru Shell, Phillips, Marathon, Elf, Enterprise, Mobil, Texaco, BP, Statoil, Arco, Amoco, Amerada Hess, Esso ofl., alt feløg, sum eisini vilja vera við í leitingini á føroyska landgrunninum.

Donald Michie frá ASCo sigur, at økið á Sundi kann takast í brúk nærum alt fyri eitt, um tað skuldi verið neyðugt. Hann heldur, at nýggja felagið ASCo Føroyar kann fáa stóran týdning fyri føroyska búskapin. Tað kann vera við til at fáa gongd á smáídnaðin og útvega arbeiðspláss. Eisini kann felagið vera við til at útbúgva arbeiðsmegi, harav venjing kann fara fram bæði í Noregi og í Bretlandi.

Eisini kann felagið vera við til at menna ídnaðin í Føroyum, eitt nú til at umvæla oljupallar. -Samanumtikið dámar okkum avbera væl hetta samstarvið við Tórshavnar Skipasmiðju. Her er sjálvandi talan um forrætning, men eg haldi, at tit eiga eitt so ótrúliga vakurt land, at tað er eisini sera umráðandi at fara fram á rætta hátt. Og her kunnu royndirnar hjá ASCo koma væl við heldur Donald Michie.



*Gunvør Balle hevur staðið á odda fyri øllum fyrireikingunum til verkætlanina á Sundi. Hon starvast sum stjóri fyri frálandsvirkseminum hjá Skipasmiðjuni. Her er hon saman við Donadl Michie frá ASCo við verkætlanini*


**Ríðistevna í Vágum**

20. juni

**Hotel Vágar** bjóðar:

Stevnubúffur v/ ymsum tilhoyri

Vel millum: **Chips-bakaði epli-smørstokt epli-Provence eplir v/ sós: Bearnesesós-reyðvinssós-soppasós-piparsós-salatborð**

**Einans kr. 129,-**

Paprikasnitzel og smørstokt eplir

Salatborð

**Einans kr. 95,-**

OMANÁ:

Frukt v/ rákremi og kaffi

**Einans kr. 39,-**

Amaretto fromaga og kaffi

**Einans kr. 39,-**

Til BØRN:

Hosnarungi v. chips og remoulatu

ella Spaghetti Bolognese

OMANÁ:

Ís v/ sjokolátasós

**Einans kr. 55,-**



**Hotel Vagar**

Tlf. 33 29 55